LM-088/2023

Mammuhjálpin

Løgtingsmál 6.

Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um fosturtøku

Mammuhjálpin tekur ikki undir við lógaruppskotinum hjá Landsstýrinum, og vit vilja frámæla Føroya Løgtingi at samtykkja lógina. Lógaruppskotið frátekur børnum í móðurlívi rættin til lív, og vit meta ikki, at lógaruppskotið verður til frama fyri kvinnur í Føroyum og samfelagið sum heild.

Mammuhjálpin hevur tað virðisgrundarlag, at øll menniskju hava rætt til lívið. Uppskotsstillarin leggur vekt á, at við hesum lógaruppskotinum *...verða allar kvinnur eins fyri lógini...".*
Vit halda tvørturímóti, at lógaruppskotið ger stóran mismun á børnum við at frátaka teimum yngstu børnunum í móðurlívi rættin til lív. Vit eru ikki samd í viðmerkingini, ið sigur: *Læknafakliga er eingin endalig niðurstøða um, nær lívið byrjar".* Tað er vísindaliga greitt, at tá ein egg- og sáðkykna koma saman, so byrjar eitt serstakt menniskjalív við egnari framtíð og arvaílegu. Vit meta tí, at rætturin til lív eigur at byrja við gitna, heldur enn við føðing ella mitt í viðgongutíðini. Vit seta tí spurnartekin við logisku tankagongdina aftanfyri at seta markið fyri fría fosturtøku til 12. viku í viðgongutíðini, og uppskotsstillarin hevur ikki nakra grundgeving fyri hví júst hetta markið verður ásett.

Tað er altíð trupult at handfara, tá ein kvinna kemur í tað støðu, at hon umhugsar fosturtøku, tí tað eru nógv atlit at taka í hvørjum einstakum føri. Gransking innan fosturtøku í øðrum londum vísir, at sosialar og fíggjarligar stúranir í flestu førum eru høvuðsorsakirnar til at kvinnur velja fosturtøku. Føroyar er eitt ríkt land og lítið samfelag, og vit hava tí eina vón um, at tað ber til at hjálpa kvinnum og familjum, ið hava slíkar stúrarnir. Vit eru tá stúrin fyri, at fosturtøka kann verða ein symptomviðgerð uppá ein størri trupulleika, og vit meta tí, at man heldur skal seta størri fokus á at hyggja uppá orsakirnar aftanfyri, at kvinnur umhugsa fosturtøku, og royna at veita serstaka hjálp í hvørjum einkultum føri.

Avgerðin um at taka fosturtøku er sera trupul, og vit vita, at tað tíverri kunna vera nógv neilig árin av at fáa framt fosturtøku. Gransking innanfyri økið vísur, at kvinnur, ið hava fingið framt fosturtøku, hava ein størri vanda fyri at fáa depressión, angist, sjálvmorðstankar, sjálvsskaðan,

rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu[1]. Vit eru tí glað fyri orðingina í §7 í lógaruppskotinum, ið sigur, at kvinnan skal hava krav á ráðgeving og stuðli. Men vit eru tó stúrin fyri, at um fosturtøka verður lógarstaðfest sum ein rættur, so vilja flestu kvinnur verða sendar skjótari víðari í skipanini, tá tær venda sær til lækna við ivamálum um sín barnsburð. Tvs. at ráðgevingin og tær longru samrøðurnar kunnu í síðsta enda koma til at mangla. Her er vert at viðmerkja at tað longu í dag kemur fyri at læknar ráðgeva kvinnum í truplum umstøðum heldur at taka fosturtøku enn at gjøgnumføra viðgongutíðina, og hetta kundi skjótt blivið meira vanlig ráðgeving um hetta uppskotið varð samtykt.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur, at endamálið er *...at hava fosturtøkutalið so lágt sum gjørligt"*. Hetta er eitt gott endamál, og tað er avgjørt nakað samfelagið skal stremba eftir. Vit meta tó, at hetta er í beinleiðis andsøgn við lógaruppskotið, tí vit eru vís í, at hendan lógarbroytingin mest sannlíkt vil viðføra eina øking í fosturtøkutalinum.
Vit trúgva, at fosturtøkulógin ávirkar samfelagið og hugburðin til fosturtøku hjá tí einstaka borgaranum. Mammuhjálpin hevur eitt samstarvsfelag í Danmark, og fleiri av teimum, ið eru partur av Mammuhjálpini, hava royndir innan økið í Danmark. Vit kunna við royndum staðfesta, at føroyskar kvinnur og menn hava ein øðrvísi hugburð til fosturtøku enn danskar kvinnur og menn. Hagtøl vísa okkum somuleiðis, at fosturtøkutíttleikin er munandi hægri í Danmark samanborið við Føroyum. Ítøkiliga vóru tað í 2022 framdar 249 fosturtøkur í Danmark[2] pr. 1.000 livandi fødd børn, meðan hetta talið var 43 í Føroyum[3]. Vit eru tí stúrin fyri, at lógaruppskotið kann viðføra eina stóra øking í fosturtøkutalinum – í ringasta føri eina fleirfalding.

Uppskotsstillarin skrivar í viðmerkinginum, at fosturtøkur verða framdar óansæð um tær eru lógligar ella ikki, og man er tí stúrin fyri, at føroyskar kvinnur fara at fremja ólógligar fosturtøkur, ið eru *...lívshættisligar og ótryggar..."*. Vit halda, at slíkt uppáhald er faktuelt ógrundað, og tað er niðrandi móti føroyskum kvinnum, at illtonkja, at tær vilja seta sítt lív í váða fyri at fremja eina

---

[1] Coleman, Priscilla K.: Abortion and mental health: Quantitative synthesis and analysis of research published 1995-2009

[2] Sundhedsdatastyrelsen: https://www.esundhed.dk/

[3] Hagstova Føroya

fosturtøku. Vit síggja heldur ikki økta barnakonudeyðiligheit í londum við strangum fosturtøkulóggávum og vælvirkandi heilsuverki.

Niðurstøðan hjá Mammuhjálpini er, at vit vilja staðiliga heita á Føroya Løgting um ikki at samtykkja hetta lógaruppskotið av fylgjandi orsakum:

- Lógaruppskotið ger mismun á børnum í móðurlívi, og frátekur teimum rættin til lív
- Lógaruppskotið fer sannlíkt at føra til eina øking í fosturtøkutalinum í Føroyum – møguliga eina fleirfalding
- Vit eru stúrin fyri, at ráðgevingin og stuðulin til kvinnur, ið umhugsa fosturtøku, fer at verða manglandi, tí vandi er fyri, at tær verða sendar skjótari víðari í skipanini.
- Eitt økt fosturtøkutal kann hava neilig sálarlig árin á kvinnuna og hennara familju.

Nevndin

Mammuhjálpin